## Dýrari at flúgva í Íslandi



Nú er dýrari at ferðast við flogfari innanlands í Íslandi. Flugfélag Íslands boðaði í gjár frá, at felagið hevði hækkað prísirnar á nøkrum av innanlandsrutunum. Hækkingin er umleið seks prosent og ber millum annað í sær, at nú kostar tað 28.000 íslendskar krónur at flúgva úr Reykjavík eystur á Egilsstaðir og aftur. Árni Gunnarsson, stjóri, sigur við Morgunblaðið, at prísirnir eru hækkaðir, tí felagið noyðist rinda meiri fyri ymsar tænastur nú.

## Framløga um mekaniskt hjarta

Í kvøld og annaðkvøld fer Ólavur Thune úr Streymnesi at halda fyrilestur um, hvussu tað er at liva við einum mekaniskum hjarta. Tvær systrar hansara eru deyðar av somu hjartasjúku, sum hann hevur Ólavur er fyrsti føroyingur, sum livir við mekaniska hjartanum Heartmate II. Saman við serkønum á Ríkissjúkrahúsinum hevur hann gjørt eina framløgu á powerpoint um mekaniska hjartað, sum er eitt frambrot fyri hjartasjúklingar. Framløgurnar verða í kvøld klokkan 19.30 í Eydnuni á Oyrarbakka og annaðkvøld klokkan 19 í róðrarneystinum í Árnafirði.

# Taki bókina við mær í grøvina

**Í 15 ár hevur Kári Davidsen, studentaskúlalærari, arbeitt við at gera eina týsk-føroyska orðabók. Løn hevur hann onga fingið, og nú bókin er liðug, vil Mentamálaráðið ikki keypa hana**

ORÐABØKUR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*- Kanska helt Mentamálaráðið, at eg var so idealistiskur, at eg fór at geva teimum bókina fyri lítið og lætt. Men eg eri treiskur. Ein starvsfelagið segði við meg, at bókin fór at liggja á bringuni á mær, tá eg fór í grøvina, sigur Kári Davidsen*

Kári Davidsen, studentaskúlalærari og orðabókarithøvundur, situr á einum dýrgripi, einari týsk-føroyskari orðabók við 120.000 leitiorðum. Ein háttur at meta arbeiðið til orðabókagerð er, at 20.000 leitiorð eru eitt ársverk, tað vil siga at týska orðabókin er verd seks ársverk. Men Kári Davidsen hevur ongan sáttmála fingið við Mentamálaráðið, og hóast bókin er klár at fara til prentingar, verður tað kanska ongantíð veruleiki.

- Mentamálaráðið hevur verið ótrúliga tungt at samráðast við. Leiðslan hevur ongan áhuga í at fáa orðabøkur út, og eg havi langt síðani mist vónina, um at bókin kemur út, sigur Kári Davidsen, sum ikki ætlar sær at geva bókina ókeypis frá sær.

Fyrstu ferð hann tosaði við Mentamálaráðið var, tá Signar á Brúnni júst var vorðin landsstýrismaður, og Jóannes Dalsgaard var nýggjur stjóri á Mentamálaráðnum. Nógvir mentamálaráðharrar hava sitið síðani, men Kári Davidsen hevur onga avtalu fingið.

- Torbjørn Jacobsen gjørdi eitt sprell og lovaði mær 470.000 krónur. Men hann setti sum krav, at bókin skuldi verða liðug innan nakrar mánaðir. Tað kláraði eg ikki, og so kom nýggjur landsstýrismaður, og stuðulin varð aftur jarðlagdur, greiðir Kári Davidsen frá.

Tvey tey seinastu árini hevur hann verið í útgávusamráðingum við Orðabókagrunnin, sum er ein sjálvsognarstovnur undir Mentamálaráðnum.

Men samráðingarnar við Orðabókagrunnin hava, sambært Kára Davidsen, gingið striltið. Grunnurin heldur seg ikki hava ráð at keypa alla bókina og hevur ynskt eina minni skúlaútgávu.

Kári Davidsen sigur, at tingingarnar gjørdist so fløktar, at hann fyri trimum mánaðum síðani bað ein sakførara koma inn í málið. Seinasti fundur var fyri góðari viku síðani, men Kári Davidsen hevur lítlar vónir um nakran sáttmála.

### Ynskja minni bók

Kári á Rógvi, formaður í Orðabókagrunninum, sigur, at grunnurin hevur verið í samráðingum við Kára Davidsen, og hann væntar, at ein sáttmáli skjótt kemur undir land.

- Grunnurin hevur avmarkaðar miðlar, og vit settu okkum ikki førar fyri at fíggja eina stóra bókaútgávu, men vit hava bjóðað Kára Davidsen at geva eina minni skúlaútgávu út, sigur formaðurin í Orðabókagrunninum.

Kári Davidsen sigur, at hann er opin fyri møguleikanum at geva eina minni útgávu út.

- Men tað liggur eisini eitt arbeiðið í at minka bókina. Eg kann ikki bara klippa helvtina úr, tað má ein raðfesting og meting gerast, hvørji orð hava størst týdning til eina skúlaútgávu, greiðir Kári Davidsen frá. Og so stúrir hann eisini fyri, hvat fer at henda við restina av bókini.

- Hvør fer at tíma at geva eina stóra orðabók út, tá ein lítil er tøk? Um bara ein lítil orðabók kemur út, hevur minst helvtin av arbeiðinum verið til onga nyttu, sigur hann.

Tann vanligi hátturin at fíggja orðabókagerð í Føroyum, er at Mentamálaráðið játtar starvslønir til rithøvundar ella forløg, men Kári Davidsen hevur ikki fingið ein slíkan sáttmála í lag. Hann hevur gjørt bókina ólønt, og einasti almenni stuðul, sum hann hevur fingið, er stuðul til telduútgerð.

- Kanska helt Mentamálaráðið, at eg var so idealistiskur, at eg fór at geva teimum bókina fyri lítið og lætt. Men eg eri treiskur. Ein starvsfelagið segði við meg, at bókin fór at liggja á bringuni á mær, tá eg fór í grøvina, sigur Kári Davidsen smílandi, men leggur afturat, at hann sjálvandi helst hevði sæð, at bókin kom út til gagns fyri lærarar, næmingar, vinnulívsfólk, og onnur, sum hava brúk fyri at samskifta millum føroyskt og týskt.

## Fyrispurningur um orðabók

Eftir at Útvarp Føroya í vikuskiftinum tók málið um orðabókina hjá Kára Davidsen upp, hevur Jenis av Rana sett landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, ein fyrispurning um málið. Tinglimur Miðfloksins spyr landsstýrismannin, um hann kann kunna løgtingið um, hvør veruliga orsøkin er til at orðabókin hjá Kára Davidsen ikki er ella verður givin út, og um landsstýrismaðurin er sinnaður at taka stig til, at høvundurin fær virðiligar sømdir frá tí almenna til orðabókagerð og útgávu, uttan mun til um hann av mentamálaráðnum er biðin gera hetta verk- ella ikki.